# Ein sjómannadagur fyri alt fólkið

**Fyrireikingarnar til Føroya Sjómannadag eru í hæddini. tey fyrstu tiltøkini eru longu byrjað. – Í fjør vóru helst eini 3000 fólk til tiltakið. Í ár vænta vit at talið verður tvífaldað, sigur John William Joensen, sum er ein av stigtakarunum av Føroya Sjómannadegi.**



*Teir ungu eru eisini knáir í egningini. Føroyameistarin í egning egndi sín stamp eftir 8 minuttum og 38,10 sekundum*



*Myndin sigur alt um, hvør vann og hvør tapti hetta sjómanstakið!*



*– Hetta skal verða ein dagur fyri øll fyri alla familjuna, sigur eini samskiparin, John William Joensen. Her eygleiðir hann, hvussu agnskeringin fer fram*

SJÓMANNADAGUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Norðlýsið*

**Klaksvík:** Hetta er annað árið á rað, at klaksvíkingar bjóða til ein slíkan sjómannadag.

Í fjør var gjørd ein umfatandi skrá. Men hyggur ein eftir skránni í ár er hon ikki minni, men er enn meiri fjølbroytt enn tann undanfarna.

– Her trýtur ikki við fólki, sum hava góð hugskot til ein slíkan dag. Vit hava havt eitt stórt arbeiði við at avmarka skránna í ár, sigur John Willim Joensen, sum er ein av samskiparunum av spennandi skránni.

Í fjør kallaðist tiltakið bert fyri Sjómannadagur. Men við víðkaðu skránni í huga og ætlanunum í framtíðini hava teir í ár valt at kalla tað fyri Føroya Sjómannadag.

Bert framtíðin fer at vísa okkum, hvussu hetta tiltakið fer at menna seg. Men neyvan nakar ivi er um, at staðið, umhvørvið og vinnugrundarlagið í Klaksvík er hitta rætta til eina altjóða fiskarímessu.

## Familjudagur

Um ein hyggur eftir skránni og stevnuøkinum í ár, so er alt munandi broytt – og økt.

Skráin í fjør fevndi bert yvir ein einstakan dag, meðan hon í ár varir í eina slaka viku.

Stevnuøkið er víðkað munandi, og fevnir um ein stóran part av fiskivinnuøkinum, sum er lívæðrin í Klaksvík.

Tiltøkini á sjómannadegnum eru eisini munandi fleiri og fjølbroyttari enn í fjør. Og tí kann ein vænta, at nógv fólk fara til fiskivinnuhøvuðsstað okkara um vikuskiftið.

Tað er kortini eitt, sum ger at hetta tiltakið brýtur frá øðrum tiltøkum: Allarflestu tiltøkini eru nevniliga ókeypis!

– Ætlan okkara er at hetta skal verða ein familjudagur burturav. Her er okkurt til øll, eingin ivi um tað, sigur John William.

## Fiskarímessa

Tað hevur eydnast fyrireikarunum at fáa hendur á góðum stuðlum til tiltakið, soleiðis at fólk ikki nýtist at setast aftur av peningaligum orsøkum.

Fyri teir er púra greitt, at hesin dagurin er komin fyri at verða, og at hann kanska eisini kann mennast enn meiri: Til eina veruliga fiskarímessu á føroyskari jørð!

Her kundi ein lættliga samskipa tiltakið við ráðstevnur, framsýningar og annað við altjóða dámi.

Teir eru komnir væl áleiðis í hesi ætlanini. Í fjør var Sjómannadagurin bert ein dag, meðan hann í ár fevnir um fleiri dagar.

Hugaligt er eisini, at



*Sjómannadagurin skal vera ein hugnaligur dagur, men fólk koma saman at hugna sær og práta saman. Serliga sjómenn nýttu hetta høvið – teir fór út á Stengurnar, og komu líkasum ikki úr staði!*